Kappingarárið 2021

18. apríl



Dagsins dystarbólt letur:

# Suni Joensen

Leikskrá nr. 3

# LEIKARIN HESAFERÐ

**Stovnað:** 6. novembur 2007

**Heimavallir:**
Dungasandur í Sørvági
Valloyran í Sandavági

**Postadressa:**
Dungasandur 4, Sørvágur

**Telefon:** 590707

**Telefax:** 333550

**T-postur:**
07vestur@07vestur.fo

**Heimasíða:** www.07vestur.fo

**Formaður:**
Jón Nordendal

**Næstformaður**
Jens Kristian Haraldsen

**Skrivari:**
Finnbogi Niclasen

**Peningarøkil:**
Ingibjørn Johannesen

**Nevndarlimir:**
Egil Petersen
Eyðvør Petersen
Ove Heinesen
Rógvi Jacobsen

**Ábyrgd:**
Fróði Poulsen

**Blaðbólkur:**
Fróði Poulsen
Ingolf S. Olsen
Jóanis Albert Nielsen

**Uppseting:** Regin Davidsen

Navn: **Tór-Ingar Akselsen**

Føddur: **01-05-1981**




Hædd: **179 cm**

Vekt: **83 kg**

Pláss á vøllinum:
**Helst 10-ari, men kann spæla á fleiri plássum**

Besti matur: **Tað er ov trupult at velja eitt burtur úr rúgvuni. Okkurt føroyskt - ræst kjøt kanska.**

Heimsins besti fótbóltspælari er: **Messi**

Onnur feløg tú hevur leikt við: **HB**

Hvør er tann stuttligi á liðnum: **Allir líka keðiligir... ;)**

Hvør er pressarin á liðnum: **Asbjørn, Martin T, Jóannis. Eg kundi blivið við. Allir eru nakrir pressarar.**

Hvør á liðnum brúkar mest tíð frammanfyri speglinum: **Silas. Og eingin annar!!**

Hvør er besti teknikari á liðnum: **Teitur, Albert ella Marjus**

Besti tónleikabólkur: **Tað broytist alla tíðina. Beint nú er tað ”for King and Country”**

Besti filmur/seria: **Shawshank Redemption er góður.**



# UPPTAKTIN

*V/ Jarnhold Nattestad*

Løgmanssteypið er endiliga aftur á skránni, og vit møta FC Hoyvík í 1. umfarið, eftir at teir, í undanumfarinum fyri viku síðani vunnu 3-0 í Vági á Royn.

Steypakappingin er altíð nakað serligt, og, hóast Løgmanssteypið er ein av mest umráðandi kappingunum í landinum, og eitt tað størsta ein fóltbóltsleikari kann vinna, er tað samstundis eitt luftrúm í trýstinum, sum landskappingin leggur á leikarar og viðhaldsfólk. Steypadystirnir liva sítt egna lív og øll síggja sínar møguleikar, eins og vit í fjør tá vit vóru heilt nær við at sláa føroyameistararnar úr kappingini.

Og dysturin móti FC Hoyvík er einki undantak. Vit møta einum liði, sum stríðist í 2. deild, eftir at teir í fjør fluttu niður úr 1. deild, meðan vit fluttu upp úr 1. deild. Men júst hetta ger at teir kunnu spæla uttan trýst móti okkum, favorittunum. Teir hava alt at vinna og vit alt at tapa. Og tað er tá, vandin er størst. Men vit eiga at hava nokk í okkum til at vinna dystin og pláss í fjórðingsfinalunum.

FC Hoyvík hava, sum longu nevnt, ikki fingið góða byrjan í 2. deild og stríðast við at fáa nøktandi úrslit, um teir skulu flyta uppaftur í 1. deild. Eftir tvey umfør hava teir bert fingið 1 stig, fyrst stórtap móti 2. liði hjá B68, og síðan javnleik móti 2. liði hjá AB. Í steypakappangini varð tó eingin slingur í valsinum í undanumfarinum. Dysturin var leiktur á Eiðinum í Vági, og hoyvíkingar vunnu sannførandi 3-0 sigur.

Tveir kenningar eru á liðinum hjá gestunum úr Hoyvík: Ásmund Hansen, sum í fleiri ár var fastur fúsur á liði okkara, bæði í 1. deild og í Betri Deildini, á fleiri plássum, og málverjin, Petur Meinhard Magnussen, sum árini 2012 til 2015 vardi mál okkara. Vit ynskja teimum væl komnum vestur og góðan dyst.

Fyri okkara viðkomandi hevur árið hepnast hampuliga væl. Vit hava, eftir 5 dystir í landskappingini fingið 6 stig, móti B68 heima og TB úti. Vit skulu venja okkum til hægri tempo og sterkari mótstøðu enn í fjør, so vit skulu læra skjótt.

Vit møttu FC Hoyvík sjálvsagt tríggjar ferðir í fjør, í 1. deild, og úrslitini vóru góð - fyri okkum. Vit vunnu 3-0, 1-5 og 7-1, og tann seinasti var seinasti dysturin á árinum, tá vit veruliga hátíðarhildu uppflytingina. Og teir fluttu niður. Tað kundi givið eina ábending um, at vit eiga at vinna dystin í morgin. Men alt kann henda og vit mugu taka dystin í størsta álvara.

**Koyrið á 07 Vestur!**

# VESTMEK

MASKINVERKSTAÐUR & SMIÐJA



**Vestmek** bjóðar góða góðsku
fyri góðan prís





VESTMEK

MASKINVERKSTAÐUR & SMIÐJA

Bryggjan 17    380 Sørvágur    Faroe Isands    www.vestmek.fo

Grannskoðan // Ráðgeving // Bókhald // Roknskapur

Skalt tú meta
um framtíðina
mást tú
kenna fortíðina

Januar
LØGGILT GRANNSKOÐANARVIRKI

WWW.JANUAR.FO

sendistovan

Sand- og skervsølan
í Sandavági

Alt innan:
- tilfar
- veitan
- levering

Finn meg á
facebook

Tlf: 213577

Lastvognskoyring v/ Erhard Dam

RISIN
BÓKHALDSVIRKI

TEL. 58 43 89

# Ítróttur og hønureyv

At spæla fótbólt hevur altíð hugtikið menn og nú eisini konurnar, og bóltspæl er elligamalt.

Fyri nú nógvum árum síðan varð ikki so nógv gjørt burtur úr búnanum, tí tá spældu menn mest til stuttleika. Men onkuntíð kundi tað vera trupult at fylgja við í, hvør var hvør, tá ið eingin var í búna, serliga um tú ikki persónliga kendi teir, sum runnu á vøllinum. Í eini ítróttafrásøgn í Dimmalætting fyri einum hálvthundrað árum síðan gramdi frásøgumaðurin seg og segði, at tað hevði verið ein fyrimunur, um liðini høvdu eyðkennisbúna. Tí har runnu menn aftur og fram á vøllinum vásaklæddir, summir í hvítari, aðrir í puntutari skjúrtu, summir í skipsella myrkamorreyðari troyggju og onkur í undirtroyggju. Haldi tó ikki at nakar var í tjóðveldisblusu, og hon er kanska heldur ikki so gomul. Teir flestu vóru í terylene- ella tweedbuksum, og fleiri gingu í seðlum.

Seinnu árini er alt blivið so skipað. Har eru komnir flottir búnar, sum ikki bara eru sjálvt eyðkennið hjá liðnum, men eisini háttvirdir markørar. Tí gott er at vita og fáa staðfest, at eisini vit hava okkara lið, sum vit halda við, bæði tá ið tað gongur væl ella illa. Eisini tey gomlu herliðini høvdu síni hermerki. Og nú er tað ikki longur ein og hvør, sum seymar búnar, nei, nú skulu stóru altjóða fyritøkurnar seta sítt merki á búnan, áðrenn hann kann brúkast.

Í dag spælir heldur einki fótbóltslið uttan ein ella fleiri sponsorar í rygginum, sum vit plaga at taka til.

Real Madrid hevur lýsing á búnanum við slagorðinum Fly Emirates, og fyri tað fær hetta megnarliðið eisini fleiri hundrað milliónir krónur afturfyri. Og eg gangi út frá, at flogfelagið Emirates eisini flýgur við Real Madrid-spælarum ókeypis um allan heim. Tí tað er eisini ein fongur fyri flogfelagið, at hava kend og víðagitin ferðafólk við umborð. Soleiðis hava øll lið, sum halda seg vera nakað, sín sponsor. Føroyska landsliðið í fótbólti hevur Bakkafrost sum høvuðsstuðul, og eg rokni við, at Atlantic Airways er offisielt flogfelag hjá landsliðnum og flýgur landsliðið aftur og fram til dystir. Men her eru nú ikki so nógv flogfeløg at velja ímillum. At spæla og at flúgva fyri Føroyar eru slagorð, sum festa seg.

Nú herfyri frættist, at Bilasølan stuðlar 07 Vestur, sum júst eru fluttir upp í bestu deildina. Og so skal búmerkið hjá Bilasøluni sjálvandi setast á búnan. Um spælarar nú skulu keypa bil frá hesi somu bilasøluni, sigur søgan tó einki um.

Vit kunnu altíð spyrja, hví vinnan stuðlar fótbóltinum og ítróttinum. Sjálvandi er tað ikki bara tí, at vinnan dámar ítrótt. Nei, hon væntar okkurt afturfyri. Vælvild er av alstórum týdningi í handilsvinnuni, tí vit keypa frá teimum, sum okkum dámar. Og serliga í ítróttini, har nógv stendur upp á spæl bæði ítróttaliga og ikki minst kensluliga, er møguleiki hjá vinnuni at vinna sær vælvild, um hon stuðlar. Onkuntíð kundi tú ynskt, at vinnan eisini stuðlaði øðrum enn ítróttini, men tað er nú so, at tað nyttar lítið




at stuðla tí, sum eingin gevur sær far um, tí sum ikki er cool, men heldur moðið, fyri at brúka hesi bæði nógv brúktu hugtøkini; tað verið seg bygdasøvn, frítíðararbeiði ella tílíkum. Tí vit mugu ásanna, at pengarnir fyri lýsingar muna nú einaferð best, har tað hendir okkurt, og har spenningur er í luftini. Men annað verður eisini stuðlað. Til dømis stuðlar Hiddenfjord Rudda Føroyar og Frælsur ítróttur í Føroyum.

Men stuðul krevur eisini, at felagið, liðið og viðhaldsfólkini gera sítt til, at virkið sum stuðlar fær undirtøku. Tað gongur ikki at onkur á landsliðnum sigur seg dáma betri laksin hjá Hiddenfjord enn tann hjá Bakkafrost, tá ið tað nú einaferð er Bakkafrost, sum stuðlar. Men lat tað ikki enda sum sagt í orðatakinum: Djúpt má hann níga, ið kyssa skal hønureyvina.




BANKNORDIK

**Heili 85% av føroyingum hava ikki nóg gott innlit í sína pensjón og sínar lívstryggingar. Ert tú ein av hesum?**

Kanna tína støðu á **banknordik.fo/pensjon**

*Ráðgeving, sum øll skilja*

EM Asfalt

Tel. 22 51 10 & 22 47 16

jn.fo

# VIÐLÌKAHALDSFRÌTT











## PLASTKLÆDNING OG BJÀLVING

Vit umboða dygdar húsaklæðningin úr plast.
Týski klæðningurin er sera væl egnaður til føroyska veðurlagið.

10 ymiskir litir eru at velja í,
og horn og listar fáast í somu litum.

Brettini eru heili 6 metur til longdar.

SANDAVÁGS TIMBURHANDIL

Hillingatangi - 360 Sandavágur - Tlf. 332700 - www.timbur.fo

# Bilasølan

STUÐLAR

07 VESTUR

ŠKODA



**Flott snið og týsk góðska, tá hon er allarbest.**


Sørvágs kommuna
stuðlar 07 Vestur
Varðagøta 8 • FO-380 Sørvágur • www.sorvag.fo


Vága kommuna
stuðlar 07 Vestur
www.vaga.fo
VÁGA KOMMUNA

| Leikari | Aldur | Dystir | Mál | Gult | Reytt | Minutir |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Erling F. Myklebust | 24 | 5 | 1 | - | - | 450 |
| Jóannis á Steig | 24 | 5 | 1 | 1 | - | 450 |
| Silas Eyðsteinsson | 23 | 5 | - | - | - | 450 |
| Martin Tausen (L) | 30 | 5 | - | 3 | - | 450 |
| Martin Heiberg | 24 | 5 | | - | - | 444 |
| Predrag Jeremic | 33 | 5 | - | 3 | - | 343 |
| Ragnar Weihe | 19 | 5 | - | - | - | 317 |
| Asbjørn Heðinsson | 20 | 4 | - | - | - | 360 |
| Eiler Fróðason | 17 | 4 | 2 | 1 | - | 360 |
| Tór-Ingar Akselsen | 39 | 4 | 1 | - | - | 323 |
| Teitur Olsen | 22 | 4 | - | 2 | - | 193 |
| Dann Fróðason | 20 | 3 | - | 1 | 1 | 243 |
| Heine Mortensen | 30 | 3 | 1 | - | - | 208 |
| Dánial Pauli Lervig | 29 | 3 | - | - | - | 158 |
| Zoran Vojovic | 35 | 2 | - | - | - | 84 |
| Sølvi Egilsson | 26 | 2 | - | - | - | 39 |
| Albert Theis Nielsen | 21 | 2 | - | - | - | 21 |
| Høgni E. Nielsen | 23 | 1 | - | - | - | 27 |
| Marjus E. Nielsen | 17 | 1 | - | - | - | 3 |
| Ingi Joensen | 18 | 1 | - | - | - | 2 |
| Ari í H. Petersen | 18 | - | - | - | - | 0 |
| Sámuel Eyðsteinsson | 20 | - | - | - | - | 0 |
| Brandur Heinesen | 18 | - | - | - | - | 0 |
| Venjari: Heðin Askham | | | | | | |

| Leikari |
|---|
| Petur M. Magnussen |
| Bjarni Brimnes |
| Ragnar Rasmussen |
| Kristin Mouritsen |
| Rúni Hammer |
| Pætur Rein |
| Tróndur Arge |
| Hugin Ferber |
| Tór av Skarði |
| Hávar Albinus |
| Ingmar Dam |
| Elias Evensson |
| Jón Rói Høgnesen |
| Ásmund Hansen |
| Magni Steintún |
| Vensil Djurhuus |
| Niklas Fríði Jacobsen |
| |
| Venjari: |
| Oddbjørn Joensen |

unicar.fo

BILÚTLEIGAN, OG EISINI UMVÆLA VIT SKAÐAR,
LAKKERA OG SKIFTA RÚTAR + 298 544000

# STIGATALVAN

| # | Lið: | D | V | J | T | MF | MÍ | MM | Stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | KÍ | 5 | 5 | 0 | 0 | 16 | 1 | 15 | 15 |
| 2 | HB | 5 | 3 | 1 | 1 | 19 | 5 | 14 | 10 |
| 3 | NSÍ | 5 | 3 | 0 | 2 | 12 | 9 | 3 | 9 |
| 4 | Víkingur | 5 | 2 | 2 | 1 | 5 | 4 | 1 | 8 |
| 5 | ÍF | 5 | 2 | 1 | 2 | 8 | 12 | -4 | 7 |
| 6 | B36 | 5 | 1 | 3 | 1 | 5 | 5 | 0 | 6 |
| 7 | 07 Vestur | 5 | 2 | 0 | 3 | 8 | 16 | -8 | 6 |
| 8 | EB/Streymur | 5 | 1 | 2 | 2 | 4 | 9 | -5 | 5 |
| 9 | B68 | 5 | 0 | 2 | 3 | 6 | 12 | -6 | 2 |
| 10 | TB | 5 | 0 | 1 | 4 | 5 | 15 | -10 | 1 |



**Okkara málskjúttar: Eiler Fróðason 2, Erling Myklebust 1, Tór-Ingar Akselsen 1, Heine Mortensen 1, Jóannis á Steig 1, Sjálvmál 2.**

CARRO
carro.fo - 21 25 51

FAE VÁGA FLOGHAVN

Giljanes bussar koyra um alt landið




Tel. 21 98 99 giljanes@giljanes.fo

.fo
Vágaportalurin

Vágafólk lesa
Vágaportalin

.fo
Vágaportalurin




VisitVágar
part of
the Faroe Islands




FOSSÁ

FROZEN FISH LANDING






**Neinbjørn Nattestad**
Bilverkstaður
Tlf. 332727 | Fax. 333727

MÚRARIN
V/ Kell E. Jensen
Kálvalíðvegur 10
370 Miðvág
tlf. 332779 og 222101
t-post: murarin@olivant.fo


BETONG RUNT ALT LANDIÐ
58 50 25 ella 31 50 60
Vit veita eisini vegleiðing í sambandi við betongsløg og styrki
Blandistøðin er góðkend av Norska Kontrollrådet
J&K BETONG
J&K
BETONG
31 50 60


Sp/f Mykines
Bryggjan 17
FO-380 Sørvágur
Tel. +298 21 08 70
www.mykines.fo
mykines.fo
must see from sea

# Bílegg títt kort her

betri.fo/fjepparakort



# DYSTARSKRÁ 2021 BETRIDEILDIN

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1. | 07-03-2021 | 07 Vestur - B36 | 0-2 |
| 2. | 13-03-2021 | 07 Vestur - B68 | 3-2 |
| 3. | 20-03-2021 | ÍF - 07 Vestur | 3-1 |
| 4 | *28-04-2021 | 07 Vestur - EB/Streymur | (útsettur) |
| 5. | 11-04-2021 | HB-07 Vestur | 7-0 |
| 6. | 14-04-2021 | TB - 07 Vestur | 2-4 |
| 7. | 25-04-2021 | 07 Vestur - Víkingur | |
| 8. | 02-05-2021 | 07 Vestur - KÍ | |
| 9 | 08-05-2021 | NSÍ - 07 Vestur | |
| 10. | 13-05-2021 | 07 Vestur - KÍ | |
| 11. | 16-05-2021 | B36 - 07 Vestur | |
| 12. | 24-05-2021 | B68 - 07 Vestur | |
| 13. | 12-06-2021 | 07 Vestur - ÍF | |
| 14. | 20-06-2021 | Víkingur - 07 Vestur | |
| 15. | 26-06-2021 | 07 Vestur - NSÍ | |
| 16. | 27-07-2021 | 07 Vestur - EB/Streymur | |
| 17. | 02-08-2021 | HB - 07 Vestur | |
| 18. | 08-08-2021 | 07 Vestur - TB | |
| 19. | 15-08-2021 | EB/Streymur - 07 Vestur | |
| 20. | 22-08-2021 | ÍF - 07 Vestur | |
| 21. | 28-08-2021 | 07 Vestur - B68 | |
| 22. | 12-09-2021 | 07 Vestur - B36 | |
| 23. | 19-09-2021 | KÍ - 07 Vestur | |
| 24. | 26-09-2021 | 07 Vestur - Víkingur | |
| 25. | 17-10-2021 | NSÍ - 07 Vestur | |
| 26. | 24-10-2021 | 07 Vestur - HB | |
| 27. | 30-10-2021 | TB - 07 Vestur | |


BÓNUS
STUÐLAR ÍTRÓTTINUM Í NÆRUMHVØRVINUM
mánadag til leygardag | 9-22



Dalsbø Sp/f tlf. 228991



www.wt.fo

VESTPACK

VESTPACK

VESTPACK

## Handilsvirkið Niclasen

Timburhandil og byggibúð




Handilsvirkið Niclasen - Bakkavegur 26
Teldupostur: niclasen@niclasen.fo
TLF: 33 20 01 - FAX: 33 20 50

SMIÐJAN
TEL 30 88 88

Klima

MTHøjgaard

Movement that inspires


Øll hava rætt til góð
BARNAÁR
Drekka foreldur tíni ov illa?
Les meira á barnaár.fo
Modelmynd


Föroya Bjór
NÚ
Í DÓS
Jolly
ORANGE
Jolly
ORANGE
FÆST KRING
LANDIÐ

# Familjubuffét

**Mán-Hós: Kl. 16.30 – 20.00**
**Fríggjadag: Kl. 16.30 – 21.00**
**Leygardag og Sunnudag: Kl. 13.00 – 21.00**



## Et, alt tú orkar, fyri 139,-
**(12 ár og eldri | Íroknað ísbuffét, sodavatn og kaffi/te)**

## Og títt barn etur fyri einans 70,-
**(11 ár og yngri, saman við foreldrum. Íroknað ísbuffét og sodavatn)**

## Bólkar (min. 10 fólk) 100,-
**(11 ár og yngri, saman við minst einum gjaldandi vaksnum. Íroknað ísbuffét og sodavatn)**

**Lat okkum ordna innkeypið og uppvaskið**

PIZZA 67

**www.pizza67.fo – Tel 356767**

Vit hava 3 sløg av pizza, salat, 4 sløg av dressingi, nachos, nýbakað hvítleyksbreyð, høsnagrýtu, nuggets, buffalo høsnaveingir, várrullur, chips, rís og 5 sløg av sodavatni, og omaná fáa tit 7 sløg av ísi og kaffi.



SANSIR
Heildar-
loysnir
frá
ArtiCon
HOTEL BRANDAN
ARTICON
Articon P/f · á Hjalla 20 · 188 Hoyvík · Tel. 350 700 · www.articon.fo




Betong og timburarbeiði
Jóni Durhuus, byggimeistari • FO-350 Vestmanna • Tlf. 424473 – 223124

SPORT 24

KEYP EISINI OKKARA VØRUR
Á FØROYA FEITASTA NETHANDLI

WWW.SKALKUR.FO

ÓKEYPIS TIL DYRNAR
Í ØLLUM FØROYUM.

| SMS 31 95 12 | SALTANGARÁ 45 95 12 |

SPEKT

løggildir
grannskoðarar

Staravegur 17
Postsmoga 3258
110 Tórshavn

Telefon 34 34 34
spekt@spekt.fo
www.spekt.fo




Frá stórum til smærri

MASKINGREVSTUR

- PLANERING
- ÚTGREVSTUR
- BREKKING



HIDDEN**FJORD**

RAISED IN THE WILD

# Fyrsti alari í heiminum at gevast við flogflutningi

At flúgva vøru elvir til óneyðugt $CO_2$-útlát.
Ov nógv $CO_2$-útlát elvir til veðurlagsbroytingar.



Við at skifta til sjóflutning er $CO_2$-útlátið fyri flutning til USA minkað við heili **94%**